gult cyan magenta svart



# Til sølu

Brúktur barrdiskur v/ kølidiski, borð, stólar og sofur til sølu hvør sær ella saman.

RIO BRAVO RESTAURANT

**Tlf. 219696**

# Kokkur

Søkt verður eftir kokki. Arbeiðstíðin er 160 tímar um mánaðin. Løn eftir avtalu.

RIO BRAVO RESTAURANT

**Tlf. 219696**

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**

# Skrivstovufólk søkist

Fyri rætta fólkið er á Arbeiðseftirlitinum eitt sera áhugavert og spennandi starv leyst at søkja til setan sum skjótast.

**Arbeiðsøki:**
Skrivstovufólkið kemur at hava hava ábyrgd av hesum økjum:

- Bókhaldi og roknskapi stovnsins, herundir FSL-skipanini
- Fakturering og brævaskifti við viðskiftafólk
- Telefon- og postavgreiðslu
- Vanligt skrivstovuarbeiði

**Førleikakrøv:**

- Skrivstovuútbúgving og roknskaparligan førleika.
- Vera fyrikomandi og hava góð samstarvsevnir.
- Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.
- Umsøkjari við royndum/kunnleika til EDV á nýtslustøði er ein fyritreyt.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Setanarstaður:**
Arbeiðseftirlitið, Falkavegur 6, P.O.Box 1134, FO-110 Tórshavn.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn til starvið merkt »skrivstovufólk« skal vera Arbeiðseftirlitinum í hendi innan 18. apríl 2001.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Eli Davidsen á tlf. 31 78 11.

**Almanna- og Heilsumálastýrið**
*Starvsfólkadeildin*

# Almanna- og heilsuatstøðingur

Á **B5** eru hetta starv leyst at søkja til setan skjótast gjørligt:

- fast starv á starvsbrøki 0,5 í náttarvaktum (5 nætur — frí 9 dagar)

Deildin er ein kirurgisk deild við servitan innan ortopædi, maga/tarm og urologi. Vit hýsa eisini sjúklingum við almenn kirurgiskum, gynækologiskum, eyga, oyra, nøs og hálsasjúkur. Vit hýsa 25 sjúklingum.

**Vit søkja eftir almanna- og heilsuatstøðingi, sum**

- hevur fakliga vitan og royndir í kirurgiskari sjúkrarøkt
- er fleksibul
- hevur góð samstarvsevnir
- er opin og positiv
- vil søkja mennandi avbjóðingar
- er kreativ og dugir at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar

**Vit bjóða**

- eina sera spennandi, fjølbroytta og gevandi deild við nógvum fakligum og persónligum avbjóðingum við møguleika fyri persónligari menning og at ávirka egnar arbeiðsumstøður
- eitt fakligt og spennandi arbeiðsumhvørvi við dugnaligum og positivum arbeiðsfeløgum

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Elin Vitalis, deildarsjúkrasystir á telefon 31 35 40, lokal 105 ella Ceciliu Vestureið, yvirsjúkrasystir, lokal 127/kallara 81-129.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

Umsóknarfreistin er 20. apríl 2001 kl. 14.00.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina skivliga umsókn við avriti av prógvum, autorisatión og viðmælum til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

# Bygningur til sølu í Skopun

Á ídnaðarøkinum í Skopun er verkstaðsbygningur við innrættaðum skrivstovuhølum til sølu.

Bygningurin er uml. 200 m².

Niðara hædd er innrættað sum verkstaður.

Ovara hædd er innrættað sum skrivstova.

J&K
**P/F J & K Petersen**
Tlf. 315060

# Ognir í Vági

Vit selja hesar sethúsaognir í Vági:

1. Sethús við bilverkstaði.
   Í sethúsapartinum, sum er ovari partur, eru 2 stovur, køkur, 4 kømur, baðiverilsi, hjallur og gongd. Bilverkstaðið hevur øll vanlig rakstrargøgn, amboð og nakað av eykalutum.
2. Hin ognin er tvey samanbygd hús við garagu.
   Størri parturin er innrættaður soleiðis:
   Loft: 4 kømur og baðiverilsi.
   Miðhædd: køkur, gangur og stova.
   Kjallari: 1 kamar og restin er ráur kjallari.

   Minni parturin er innrættaður soleiðis:
   Ovara hædd: 2 kømur og baðiverilsi.
   Niðara hædd: stova, køkur, gangur og vaskirúm.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til

**Advokatskrivstovuna**
Fr. Petersensgøtu 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145
att.: Óla Jákup ella Heidi

# Frá S&K-felagnum

Lýst verður til eykaaðalfund í hølum Føroya Arbeiðarafelags, Tjarnardeild 5, Tórshavn,

**leygardagin 7. apríl 2001, kl. 15.00.**

Dagskrá: Støðutakan til arbeiðssteðg.

S&K **Nevndin**

fk

# FK søkir eftir reingerðarfólki skjótast gjørligt

at gera reint í handlinum 14 tímar um vikuna.

Vit vænta av tí fólki, ið sett verður, at tað er ábyrgdarfult, nærlagt og sjálvstøðugt.
Løn samb. sáttmála Havnar arbeiðskvinnufelags.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:
Bo Møller Hansen, tlf. 311320 ella 217593.

Seinasta freist at søkja: 18. apríl 2001.

**FK í Miðbýnum**

# Ekspeditrisa m/k

søkist til hálvan dag at byrja sum skjótast.

**P/F FÓTBÚNI Tlf. 311705**

**Sosialurin**
**www.sosialurin.fo**

gult cyan magenta svart



# LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

## Akfør

**LASTBILUR VIÐ KRANA**
Lítil lastbilur við krana til sølu. Eldri Mitsubishi L300, ið krevur ábøtur til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 372020/221199

**DEKK YNSKJAST**
4 dekk stødd 155 x 12 ynskjast til keyps fyri sámuligan prís.
Tlf. 216089

**PEUGEOT 2.0 GTI**
árg. 99 sær út sum nýggjur til sølu.
Tlf. 221508

**CITROEN BX 19**
GTI, árg. 88-89 til sølu. Ábøtur krevjast, hevur ikki plátur.
Tlf. 252153

**MAZDA 626**
árg. 1987, sýnaður 27.9.2000 til sølu.
Tlf. 320576 eftir kl. 19

**VW GOLF**
árg. 87, 5 hurðar til sølu.
Tlf. 443093 kl. 8-15

**MISTUBISHI COLT GL**
koyrt 152.000 km, nýliga rustviðgjørdur, koyrir væl, sýnaður fyri 9 mðr. síðani, bíliga til sølu.
Tlf. 250425

**FORD ORION 1.8 DIESEL**
Ein Ford Orion 1.8 diesel, árg. 92 til sølu um hóskandi boð fæst. Í sera góðum standi.
Tlf. 457375

**BMW 518i**
jan. árg. 87, sýnaður í feb. 2001 til sølu fyri kr. 15.000,-
Tlf. 322373 ella 214373

**EYKALUTIR TIL**
Daihatsu Rocky árg. 85, toppstykki, startari, dýnamo, dysurør, kølivatnspumpa, selist heilt bíliga.
Tlf. 322762 ella 221913

**SUBARU WD4**
bíliga til sølu. Sýnaður í ár.
Tlf. 322762 ella 221913

**SUMMARDEKK**
Fýra Pirelli P1000 155/80 R13 79T at kalla óbrúkt, seljast fyri 1500 kr. 1 summardekk + 1 vetrardekk fylgja við, lítið brúkt.
Tlf. 311465

**SPORTFELGUR**
15" sportfelgur við dekkum til sølu.
Tlf. 448432 ella 218432

**NISSAN MICRA**
árg. 92 til sølu. Koyrt 101.000 km, sýnaður í februar 2001.
Tlf. 333270

**NISSAN SUNNY**
árg. 88, kann ikki koyra sum er, men er góður sum eykalutir.
Tlf. 219152 ella 319152

**OPEL KADETT**
vøruvognur til sølu sum eykalutir, fyri 2.000 kr.
Tlf. 211643

**TOYOTA COROLLA 1,3**
Árg. 89, koyrt 92.000 km, 3 hurðar, bilurin er nýliga sýnaður.
Tlf. 212114 - 319927

**HONDA ACCORD 2,0 EXI**
árg. 88, til sølu. Nýsýnaður, hevur sleipikrók, el-rútar, el-sóltak, el-spegl, sentrallás, 16" sportsfelgur. Nýggj heilársdekk á felgum fylgja við.
Tlf. 251582 ella 251581

**VW POLO**
árg. 84, til sølu. Hevur ikki plátur. Krevur ábøtur. Bilurin koyrir.
Tlf. 222546 ella 254664

**YNSKIST**
Motorur til Mitsubishi L 200 diesel ynskist til keyps.
Tlf. 212158

**TIL SØLU**
Stuttur Galloper við setrum aftan, koyrt 36.000 km, 2 ára gamal og í góðum standi.
Tlf. 421037 / 421142
ella 214142

**TIL SØLU**
Nýsýnaður Mitsubishi Pajero, longra modellið, til sølu.
Tlf. 211830 / 311830, e. kl. 16

**MITSUBISHI L 200**
árg. 94, til sølu sum eykalutir fyri 2.500 kr.
Tlf. 221122

**ISUZU NRK 575**
árg. 91, til sølu sum eykalutir fyri 2.500 kr.
Tlf. 221122

**BILUR TIL SØLU**
Mitsubishi Shogon L 300. 4 WD, frá 8/92, innregistreraður sum persónbilur.
Tlf. 215542

**NISSAN BLUEBIRD U 11**
árg. 85, bíliga til sølu sum eykalutir.
Tlf. 444737
ella 214437

**BILUR TIL SØLU**
Bilur til sølu Vælhildin 3 1/2 ára gamal Peugeot 106 - diesel til sølu. Hevur koyrt 41.000 km.
Tlf. 221428

**NISSAN SUNNY**
árg. 11/89, í góðum standi, nýsýnaður og hevur sportsfelgur. Annar bilur verður latin við í keypinum sum eykalutir.
Tlf. 250777, Sofus, e. kl. 15.30

**TVÆR FELGUR**
sum passa til Ford Escort til sølu.
Tlf. 310352

**VW GOLF 1.6 DIESEL**
árg. 88, 5 hurðar, píkadekk, alufelgur og cd-spælara til sølu.
Tlf. 212681

**MITSUBISHI 1.8 TD**
Er nakar, sum eigur eykalutir ella heilan bil sum eykalutir bíliga til sølu, so ring
Tlf. 219171

**OPEL MANTA**
1,8 ltr, árg. 82, nýsýnaður, til sølu fyri 6.000 kr. Ein rúgva av eykalutum fylgir við.
Tlf. 217558

**TIL SØLU**
Fýra 185-65/14 píkadekk á nýggjum felgum til sølu.
Tlf. 448990

**TIL SØLU**
Opel Kadett 1.3, árg. 85, koyrir væl, men krevur smávegis ábøtur.
Tlf. 421128

**SUMMARDEKK**
Lítið brúkt summardekk: Fýra Bridgestone RE720 195/55x15 og fýra Continental Ecocontact 195/65x15.
Tlf. 250855

**VW GOLF 1,6 DIESEL**
árg. 88, 5 hurðar, píkadekk, alufelgur og cd-spælara, til sølu.
Tlf. 212681

**TIL SØLU**
Opel Ascona diesel, sera økonomiskur, sýnaður í jan. bíliga til sølu. Tlf. 213195
Tlf. 213195

## Amboð

**TIL SØLU**
Lítið brúkt blandimaskina, sum tekur hálvan sekk, til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 318754

**TIL SØLU**
Brúktar Tekko forskallingar verða seldar við avsláttri. Forskallingslutir til Hünnebeck »Let Form« 75x250 cm sum kílar, nakrir eftir á goymslu. Kaj Andreasen & Co
Tlf. 315600

**YNSKIST**
Hevur tú eina blandimaskinu at selja mær, so ring
Tlf. 217030 ella 457030

## Arbeiði

**MÁLING – TILBOÐ**
Biðið verður um tilboð upp á at mála uttan tríggjar íbúðir í Berjabrekku.
Tlf. 316413 ella 316380

**REINGERÐ**
Fólk søkist til reingerð í privatum húsi 2 tímar aðru hvørja viku.
Tlf. 317234

**VASKIARBEIÐI**
27 ára gomul kvinna søkir vaskiarbeiði sum skjótast í 2-3 tímar dagliga.
Tlf. 254664

**TIL USA**
Genta um 20 ára aldur ynskis til læknahjún í Harresburg. Skal passa drong 5 ár og gentu 7 ár. Fær egið verilsi og góða løn, skal tosa enskt. Neyðugir upplýsingar vera at senda til : Sosialurin Box 76 110 Tórshavn Bill.mrk. 1063

**SØKT VERÐUR**
eftir einum fólki til lættari reingerð heima hjá mær á Glyvrum. Um tú hevur áhuga, so ring, so vit kunnu gera nærri avtalu.
Tlf. 447562 ella 216863

**MÁLING AV TEKJUM/HÚSUM**
Eg máli tekju/hús tygara skjótt og væl. Koyri eisini kring landið. Vinarliga ring
Tlf. 222845

**HJÁLP!**
Eg eri 15 ára gamalur og vil fegin hava eitt arbeiði í frítíðini.
Jákup - tlf. 316606

**GENTA/KVINNA SØKIST**
at ansa eftir 6 mðr. gomlum dreingi uml. 5 tímar um dagin. Hevur tú áhuga fyri hesum so ring
Tlf. 318283

## Barnaansing

**VIT LEITA EFTIR**
einum álítandi fólki, yngri ella eldri, at ansa eftir Niels (6 mðr.) og Tórði (9 mðr.), frá uml. kl. 8.30 til 16.30 gerandisdagar, fyribils í 4 mðr. Møguleiki er at vera heima hjá aðrari. Jóna & Hjørdis
Tlf. 221586, 318629

**VIT SÓKNAST EFTIR**
barnagóðari gentu í heim okkara 3/4 arbeiðstíð. Vit hava 3 børn, sum eru 5 mðr., 4 ár og 6 ár. Tú skalt fyrst og fremst ansa dótturini, sum er 5 mánaðir, men annað kann eisini koma upp á tal.
Tlf. 319327, Karina

## Barnaútgerð

**TVÍBURÐAVOGNUR**
Hevur onkur ein góðan brúktan tvíburðavogn/stól, helst við galesju, at selja okkum?
Hjørdis/Jóna
Tlf. 221586 ella 318629

**TIL SØLU**
Bilbarnastólur 0-13 kg til sølu. Sær út sum nýggjur.
Tlf. 332454, e. kl. 18

**TIL SØLU**
Grá leðurlook babylift, 200 kr. Stativ við baðikari, 300 kr. Skrástólur 100 kr.
Tlf. 448535

**BARNAVOGNUR**
Ein ljóst violettur, vælhildin barnavognur til sølu fyri 1.200 kr.
Tlf. 333210 - 217421

## Bátaútgerð

**FRAMBYGT 10-MANNAFAR**
36 HK Volvo Penta v/ línuspæl, 4 hydraul. snellur, línurenna, GPS v/ plottara og ekkolodd, pappír ekkolodd, VHF, Storno NMT 450 fartlf., kabyss, kr. 70.000 ella hægri bjóðandi.
Tlf. 452171 ella 222636

**10-MANNAFAR**
Bíligt 10-mannafar við 20 HK Saab motori til sølu.
Tlf. 322762 ella 221913

**OLJUTRÝST SNELLUR**
3 oljutrýst snellur og eitt ekkolodd, Furuno, F.E. 400, bíliga til sølu.
Tlf. 372637

**YNSKIST**
Lítil glastrevjabátur ynskist til keyps. Helst við leysamotori.
Tlf. 253022

**TIL SØLU**
Róðurgreiðir, kápiltrekk og ein messan mastur úr aluminium.
Tlf. 421142

## Bingo

**BINGO**
Gott bingo verður í TB-húsinum tórsdagin 12. apríl kl. 17.00. Hvørt bingo 300,00 kr. høvuðsvinningur 2 x 500,00 kr. Eykaspæl verður eisini
Tvøroyrar Bóltfelag

BINGO
verður í Stórhúshøll í Fuglafirði leygardagin 7.4. kl. 16.00.
Áhugafelagið Fløtugerði

RIMMAR PÁSKABINGO
Tað árliga páskabingo hjá EB/Streymi verður í Eydnuni 2. páskadag. Full pláta virðið meiri enn kr. 1.000,-
EB/Streym stuðlar

GOTT PÁSKABINGO
verður í Pálsstovu 7. apríl kl. 15. FUll pláta 500 kr. + síðuvinningar. Drigið millum spølini um páskaregg. Á lutaseðli 2 stór páskaregg og 2 x 1000 kr. 15 plátur 100 kr. Eyka spæl. Koyring heim.
Kiwanisfelagið Rósan

BINGO
verður í Felagslonini hóskvøldið kl. 19.30. Trekt verður ímillum spølini.
Eldrafelagið Borgin

SUÐUROYINGAR
Gott páskabingo verður í Skúlahøllini í Trongisvági mánakvøldið 9. apríl kl. 19. Hvørt bingo gávukort á 400 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli olja fyri 1.000 kr.
Tvøroyrar Borðtennisfelag

GOTT PÁSKABINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum hóskvøldið 5. mai kl. 19.00. Nógv gott at vinna so sum páskaegg, gávukort og døgurðamatur. 15 plátur fyri 100 kr.
Argja Róðrarfelag

**EYDNUHJÓL**
Stórt eydnuhjól verður á Fossánesi leygardagin 7. apríl frá kl.20.00. Vinningar: Stór føroysk páskaegg, sodavatn, karamellur, kjøt, dukkur, bilar, troyggjur, olja, fartelefonir og mangt, mangt annað.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

## Bøkur

**BØKUR TIL SØLU**
Ein rúgva av bókum frá Bogsamlerens Bogklub, alt bíliga til sølu, uml. 20,- kr. pr. stk, eisini er annað at finna. Samlingin »Sket« 10 bind, søga og hendingar í farnu øld, tekst + myndir.
Tlf. 220660

## Burturm. /funnið

**EG SAKNI KALUA!**
Eg havi mist mína gráu og hvítu koalabamsu í Havn mikudagin 28. mars. Hevur tú funnið hana, vinarliga ring.
Tlf. 321988 ella 288033, Katla 1 ár

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: [1] [2] [3] [4] [5] ferðir
***(set X)*** undir teiginum:

| | | |
|---|---|---|
| ❑ Akfør | ❑ Amboð | ❑ Arbeiði |
| ❑ Barnaansing | ❑ Barnaútgerð | ❑ Bátaútgerð |
| ❑ Bingo | ❑ Brævaskifti | ❑ Burturm./funnið |
| ❑ Býli | ❑ Bøkur | ❑ Dansur |
| ❑ Dýr | ❑ Fundir | ❑ Húsarhaldstól |
| ❑ Innbúgv | ❑ Lutaseðlar | ❑ Leikur |
| ❑ Matur | ❑ Pløgg | ❑ Samband |
| ❑ Súklur | ❑ Teldur | ❑ Tónleikur |
| ❑ Út-& sjónvarp | ❑ Ymiskt | ❑ ......................... |

***Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.***

Sent hevur:
Navn:……………………………………..
Bústaður:……………………………………
Bygd/býur:…………………………………
Tlf.: ………....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki